# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# EITT HÁLVHJARTAÐ MISÁLIT

At politikkur er glantrileikur er so mangan staðfest. Tað varð eisini staðfest skírisaftan, tá Tjóðveldi og andstøðan lótust sum um, at tey vildu fella løgmann og samgonguna. Men hetta var bert spæl fyri gallarínum. Tá Høgni Hoydal ikki ein gong kláraði at fáa síni egnu fólk til arbeiðis hendan dagin, so kann royndin at fella løgmann ikki hava verið heilhjartað.

Vit skilja væl motivini, sum andstøðan segði seg hava: Um tey nú fingu lokkað nakrar fólkafloksmenn yvirum, so kundi tað borið til at fingið samtykt eitt misálit. Vit skilja eisini, at andstøðan – eins og tjóðin annars – er frustrerað yvir fløktu støðuna, og tað, at løgmaður gongur runt og letst at væl stendur til.

Men tað nyttar so lítið, tá andstøðutingmenn sjálvir ikki møta upp! Sjálvur tingformaðurin Hergeir Nielsen úr Tjóðveldinum skulkaði hendan dagin – og tað sama gjørdi Karsten Hansen úr Miðflokkinum.

Tiltakið hjá Tjóðveldinum skírisaftan kann tí ikki metast sum annað enn vánaligt politiskt handverk. Eitt misálitisuppskot eigur ikki at verða brúkt upp á kvamsvís. Slíkar royndir undirgrava hetta týdningarmikla amboðið, sum okkara kosnu fólk eiga at kunna brúka í eini álvarstøðu. Høgni Hoydal veit, at hann skal hava seytjan fólk at atkvøða fyri einum slíkum uppskoti. Um hann so fekk lokkað nakrar fólkafloksmenn yvirum, hvat nyttar so tað, tá hann ikki fær síni egnu fólk til arbeiðis???

Sjálvstýrisflokkurin var so einasti andstøðuflokkur, sum var fullmannaður. Javnaðarflokkurin hevði heldur ikki øll síni fólk til arbeiðis hendan dagin. Hans Pauli Strøm og Andrias Petersen vóru burturstaddir uttan at hava eykafólk til arbeiðis fyri seg. Men tey vórðu innkallað í skundi – og flokkurin – sum bara hevur seks tingfólk – mátti heilt niður til nummar 13 á listanum fyri at manna tingbólkin hendan dagin.



Úrslitið av hesum glantrileiki varð, at Hans Pauli Strøm og Andrias Petersen missa einar 10.000 krónur í part av mánaðarlønini - meðan Karsten Hansen og Hergeir Nielsen einki missa av sínari løn. Misálitið frá Tjóðveldinum varð vent til eitt álit frá løgtinginum á løgmann og samgonguna - hóast nógv tekin eru í sól og mána um, at samgonguni ikki er lív lagað. Hálvhjartaða misáltisuppskotið var tann reini glantrileikur...

**» Hvat nyttar eitt misálit, tá andstøðan ikki møtir til arbeiðis?**

# Ári norðanfyri



Roysningurin Ári, sum fyrst helt til í Norðoyggjum og síðan við Ljósá, stevnir nú beina leið norðureftir.

Nýggi sendarin, sum settur varð á roysningin Ára, meðan hann helt til við Ljósá, riggar framvegis.

Tá ið Ári fór úr Føroyum, legði hann leiðina móti Íslandi. Hildiðvarð, at Ári fór til Íslands at vitja, men tað gjørdi hann ikki.

Hann svam fór norður um Ísland, so suðureftir, og í gjárkvøldið segði sendarin, at hann nú stevnir beina leið norðureftir.

Á Náttúrugripasavninum eru tey spent at frætta, um hann heldur hesa kós komandi dagarnar, og um málið er Jan Main ella kanska Svalbard.

*randi@sosialurin.fo*



**» Minnilutabólkar stýra ikki longur**

ARNE WINTHEREIG
KJAK SÍÐA 13



**» Læra okkum at lurta eftir serfrøðini**

BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN
KJAK SÍÐA 13

# Dimma nýggjar eigarar




Meginpartin av teimum seinastu 132 árum hevur Samuelsen-familjan átt P/F Dimmalætting. Men í morgin er hetta søga.

Aðalfundur verður í P/F Dimmalætting í morgin, og tá verður allur partapeningurin niðurskrivaður til 0. Harvið missa verandi partaeigararnir góðar 30 milliónir krónur, sum felagið varð vert góðum tveimum árum síðani.

Høvuðspartaeigarar vóru systrarnar Lisbeth L. Petersen og Beate L. Samuelsen, sum hava mist bróðurpartin av teimum 30 miilónunum.

Nýggjur eigari er íløgufelagið P/F Løkir, sum P/F Føroya Banki, P/F Tjaldur, P/F Krúnborg og Lækir Capital ehf í Íslandi eiga í felag.

*eirikur@sosialurin.fo*

# Ummælti uttan at síggja blaðið




Kringvarpið beyð í gjárkvøldið einum miðlaserfrøðingi á gátt at ummæla nýggja Sosialin. Tað er altíð gott at fáa ummæli av tí, sum tú hevur gjørt - men vit gjørdust eitt sindur vónsvikin, tá professiónelli miðlaserfrøðingurin als ikki hevði sæð Sosialin. Sjónvarpsverturin gav honum so eitt eintak, hann hevði liggjandi á borðinum. Miðlaserfrøðingurin tók blaðið, hugdi eftir fyrstu síðu, blaðaði upp á síðu 3, so á síðu 5, og so fall dómurin:

– Nei, hetta í sær sjálvum lokkar hvørki lesarar ella lýsarar til blaðið. Tað skal so nógv annað til hjá einum fjølmiðli, enn bara design, segði Allan Dalsgarð, sum framvegis bara hevði blaðað upp á síðu 5 í blaðnum.

Síðani spurdi Johnsigurd, um hetta var rætta løtan hjá Sosialinum at fækka útgávudagarnar. Nei, tað helt hann vera eitt afturstig at gera í einum høggi.

Allan Dalgarð helt, at Dimmalætting enn hevur tann fyrimunin, at blaðið kemur út hvønn dag.

– Teir hava frekvensin, teir koma út ofta.

Men Allan segði tó at enda, at Sosialurin hevur fyrimunin við Miðlahúsinum, Rás2 og Portalinum saman við blaðnum at gera tað rætta...

Tað, sum ikki framgekk av innslagnum í Degi og Viku var, at Allan Dalsgarð er stjóri í lýsingarvirkinum Sendistovuni hjá Nemasamtakinum. Íløgufelagið Løkir eigur Nemasamtakið, sum er systirfelag hjá P/F Dimmalætting.

*eirikur@sosialurin.fo*

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Jaspur Langgaard
jaspur@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*